TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Sosiala deild

Sosiala deild er partur av trivnaðarfyrisitingini og umsitur m.a. tey málsøki, sum sambært galdandi almannalóggávu eru lagd til kommununa at umsita.

Kommunan bjóðar eitt áhugavert starv við fjølbroyttum uppgávum í einum mennandi fakligum umhvørvi.

www.torshavn.fo

## Sosialráðgevi

Søkt verður eftir einum sosialráðgeva til sosialu deild hjá Tórshavnar kommunu. Starvið er eitt hálvtíðar farloyvisstarv.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar. Sosialráðgevin kemur m.a. at viðgera umsóknir um fíggjarlig og pedagogisk frípláss sambært kunngerð um gjaldsreglur fyri dagstovnar og dagrøkt. Deildin leggur stóran dent á tvørfagligt samstarv, og kemur sosialráðgevin at hava tætt samstarv við aðrar fakbólkar.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært galdandi sáttmála.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, deildarleiðara ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 20. mars 2003. Viðmerk á umsóknina "Sosialráðgevi".

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Dagstovnurin á Hamrinum

Á Dagstovninum á Hamrinum fara at ganga 60 børn.

Stovnurin er skipaður við 2 barnagarðsstovum við 18 børnum í hvørjari og 2 vøggustovum við 12 børnum í hvørjari.

Á stovninum eru 12 starvsfólk.

Vit bjóða eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum og har tú fært høvi at gera tína ávirkan

www.torshavn.fo

## Pedagogar til Dagstovnin á Hamrinum

Tórshavnar kommuna søkir eftir 3-4 pedagogum 30-40 tímar um vikuna og 4 hjálparfólkastørv 40 tímar um vikuna. Pedagogstørvini verða sett 15. mai 2003. Hjálparfólkastørvini verða sett seinni.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Elisabeth Henriksen, leiðara, tlf. 225784 ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. mars 2003. Viðmerk á umsóknina "Pedagogur á Hamrinum".

# Almannastovan

## Stuðulsfólk

Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki.
Sum stuðul fært tú eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
Fylgjarauppgávur Stimbran Familjuráðgeving Umlætting

**Størvini eru hesi:**

**Tórshavn**

1) – umlættingarfamilju til 4 ára gamla gentu, ávíkavist 3 og 5 nætur um vikuna. Arbeiðið fevnir um at umlætta familjuna og í fyrstu atløgu verður arbeiðið gjørt heima hjá umlættingarfamiljuni. Ynskiligt er at umsøkjarar hava kunnleika til børn við serligum tørvi.

2) – at stuðla einum 3 ára gomlum fjølbrekaðum drongi á allan hátt, við venjingum og spæli og fara við honum til viðgerð. Tímatal er 20 tímar um vikuna seinnapart, tó fríggjadag fyrrapart el. seinnapart. Ynskiligt er, at tann ið settur verður, hevur koyrikort.

3) – at stuðla einum 3 ára gomlum fjølbrekaðum drongi á allan hátt, við venjingum og spæli og fara við honum til viðgerð. Tímatali er 20 tímar um vikuna, skiftandi morgun og seinnapart. Arbeiðið er í heiminum hjá barninum og við tilknýti til dagstovn. Neyðugt er, at tann ið settur verður, hevur koyrtikort.

Setanarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Ragnhild Dahl á tlf. 35 35 10, gerandisdagar millum kl. 09.00 og 13.00, tó ikki mikudag.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu verða Almannastovuni, J. Broncksgøta 27, Postboks 3096, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 22.03.2003.

**Í umsóknini skal vera tilskilað uppgávunummar.**

# Hálvtíðarstarv

Til umsitingina í Granskingarráðnum verður hálvtíðarstarv við hesum lýst leyst at seta 1. mai ella skjótast gjørligt.

**Arbeiðið er fjølbroytt og fatar m.a. um:**
- vegleiðing og avgreiðslu í sambandi við umsóknir um stuðul
- eftirlit við játtaðum studningum
- tíðindatænastu á heimasíðuni
- fyriskipan av ráðstevnum og kunnandi fundum
- gerð av kunningartilfari
- viðlíkahald og eftirmeting av reglum og mannagongdum

**Umsøkjarin skal hava:**
- viðkomandi útbúgving ella samsvarandi arbeiðsroyndir
- góðan málsligan førleika
- góð samstarvsevni og sjálvstøðugt arbeiðslag

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. mars 2003.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Rúnu Hilduberg, stjóra, á tlf. 316 515 ella teldupost gransking@gransking.fo

Granskingarráðið hevur tvey høvuðsarbeiðsøki
- Ráðgeva landsstýri og vinnu í granskingarpolitiskum spurningum.
- Umsita Granskingargrunnin, sum veitir figging til granskingar- og menningarverkætlanir.

SANSIR 355 355

granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

Granskingarráðið · Bryggjubakki 12 · Postrúm 259 · FO-110 Tórshavn
tlf. 316 515 · gransking@gransking.fo · www.gransking.fo

<ph_1.><ph_1.><ph_1.



# LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

## Akfør

**MAZDA 626 1.8i TIL SØLU**
koyrt 160.000 km, grønur, árg. 96, í góðum standi, til sølu.
*Tlf. 221036*

**SUMMARDEKK**
Fýra summardekk til Ford Escort á felgum 850 kr.
*Tlf. 210560*

**SAAB 900i**
árg. 88, í góðum standi, nýsýnaður, prísur 12.000 kr.
*Tlf. 210560*

**TIL SØLU**
VW Polo 1.3, prísur 10.000 kr.
*Tlf. 212721*

**EYKALUTIR TIL**
Toyota Hiace Diesel, árg. 90-95 til sølu.
*Tlf. 227922*

**TIL MITSUBISHI PAJERO**
Setur aftan, toppstykki og dynamo til sølu.
*Tlf. 227922*

**OPEL ASTRA 2.2i**
16 mør. gamal sportsbilur til sølu. Hevur 147 hk og nógva eykaútgerð. 2 sett av sportsfelgum fylgja við. Til sølu fyri lagaligan pris. Møguliga í býti við annan bil
*Tlf. 225309*

**SUMMARDEKK Á FELGUM**
Góð brúkt summrdekk á felgum til sølu. Merki Michelin. Stødd 165X70.14. Til Toyota Corolla. Prísur kr. 2.000,-
*Ring tlf. 228189*

**VOLVO 440 GL**
Árg. 89 til sølu fyri 4.500 kr. Vinarliga ring á
*Tlf. 224688*

**MAZDA PICK UP**
B2200, diesel, árg. 86, bíliga til sølu.
*Tlf. 444230 ella 212230*

**PEUGEOT 106 TIL SØLU**
S16 GTI, árg. 2000.
*Tlf. 217747*

**ALUFELGUR YNSKJAST**
Alufelgur við góðum dekkum 4 x 100 til Golf III 1.9 SDi, árg. 92, ynskjast bíliga til keps.
*Tlf. 229850 ella 444154*

**FELGUR TIL SØLU!**
4 13" felgur til nýggjari Ford bilar. Passað m.a. til Ka, Fiesta og nakrar Escort, 4 dekk fylgja við. Einans 600 kr.
*Tlf. 504840*

**TOYOTA HI LUX 4X4**
Árg. 89 til sølu sum eykalutir.
*Tlf. 224835*

**TIL SØLU**
Scania 82 H við krana og skiftilast. Ein Hanix H26 B við skuffum og brekkara, árg. 2000.
*Tlf. 218618*

**XANTIA**
Motorur 1900 ynskist til keyps.
*Christian, tlf. 226500*

**PEUGEOT 306**
1.9 diesel, árg. 1995, koyrt 79.000 nýsýnaður, í sera góðum standi. Prísuppskot 80.000,-.
*Tlf. 313303 ella 254786*

**AUDI 100 2.2 3E**
5 cyl. 137 HK við servostýring. Bíliga til sølu.
*Tlf. 256811*

**FORD FIESTA DIESEL**
Árg. 92 í góðum standi, sýnaður 09/02 til sølu fyri 20.000 kr.
*Tlf. 510082*

**ÓVIRKIN SAAB**
kann brúkast sum eykalutir til sølu.
*Tlf. 260334*

**FORD SIERRA**
Bláur Ford Sierra, árg. 1991, prísur 25.000 kr.
*Tlf. 260334*

**TOYOTA COROLLA 1.5 XLI**
Sedan, árg. 7/97. 103.000 km, bláur, sær sera gott út, ikki roykjara bilur, sýnaður 10.3.02. Pikadekk eru við, koyrir sum ein dreymur (má roynast).
*Tlf. 254535*

**FORD SIERRA**
1.6, árg. 87, koyrir væl, bíliga til sølu.
*Tlf. 254396*

**TOYOTA COROLLA 1.3**
árg. 87 til sølu. Bilurin skal umsýnast.
*Tlf. 212780 ella 449922*

**MAZDA B2500**
4x4, tvey sett av dekkum píka- og summar, er rustviðgjørdur, árg. 1997, koyrt 120.000.
*Ringið 227191 ella 441582*

**VOLVO 740 TIL SØLU**
við sóltaki, nýggj pikadekk, nýggjan kølara, koyrir sera væl. Til sølu fyri 3.500 kr.
*Tlf. 254201*

**TOYOTA HIACE**
L.H. 61, árg. 88, diesel, til sølu fyri 6.000 kr. Skal til umsýn.
*Tlf. 216030*

**BMW 316**
161000 km, sýnaður nov. 2002 árg. 1986, til sølu fyri 5000 kr.
*Tlf. 441335*

**OPEL ASCONA 1.6**
árg. 87, til sølu. Bilurin er í góðum standi mekaniskt, men er smávegis rustaður í botninum. Lættur at umvæla. Einans 5.000 kr.
*Tlf. 375163*

**SPOYLARI TIL SØLU**
vegna feilkeyp. Passar til Corolla 88-91.
*Tlf. 511990*

**SPORTFELGUR**
til Toyota til sølu. Nýggj heilársdekk fylgja við.
*Tlf. 225398*

**SUBARU LEGACY ST.CAR**
Vælhildin, hvítur, árg. 97, til sølu. Prísuppskot: kr. 75.000.
*Tlf. 313513 ella 217644*

**OPEL KADET '84**
Og nýggj 13" dekk til bilin. Bilurin krevur ymiskar smáar ábøtur. Nýggjar fjarðar til stoytdoyvara. Bíliga til sølu 3000 kr ella hóskandi boð.
*Tlf. 226789, spyr eftir Henry. Best aftaná kl 15*

**NÝGGJ FORHURÐ**
Hogra forhurð til Ford Escort til sølu fyri 700 kr.
*Tlf. 210560*

**SUBARU YNSKIST TIL EYKALUTIR**
Hevur tú ein Subaru 1.6 GL, typa AC2, árg. 86 biliga, so ring
*Tlf. 210560*

**TOYOTA COROLLA 1.6i**
árg. 96 til sølu. Bilurin sær gott út, við fylgja sportfelgur, pikadekk á felgum og gott Sony anlegg. Bilurin hevur koyrt 100.000 km. Prísin kunnu vit snakka um.
*Tlf. 214762*

**VETRARDEKK**
4 dekk á felgum, passa til Toyota Avensis, stødd 185/65 R15 til sølu fyri 1000 kr.
*Tlf. 228408*

## Amboð

**CO2 SVEISIAPPARAT**
Luna 140/220 volt, í góðum standi, til sølu fyri 2500 kr.
*Tlf. 520325*

**TIL SØLU**
Drejebænke til træ og stáldrejning, 1 stk. rundsav, saver 80 mm i dybden, 1. stk. Alustia.
*Tlf. 442190*

**YNSKIST**
Hobby maskina at slípa steinar við ynskist til keyps
*Tlf. 424270 ella 286504*

## Arbeiði

**SVIMJIVENJARI**
Fuglafjarðar Svimjifelag søkir venjara til 1. lið komandi kappingarár. Áhugað kunnu ringja
*tlf. 213773, FS*

**VIKUSKIFTISARBEIÐI SØKIST**
20 ára gomul genta søkir arbeiði í vikuskiftunum. Vingarliga ring á
*Tlf. 507095*

**TILBOÐ YNSKIST**
Tilboð ynskist upp á at mála vindeygu.
*Tlf. 310774*

**2 AU-PAIR YNSKJAST**
Vit eru 2 familjur sum búgva við Mývatn í Íslandi og vit ynskja 2 góðar gentur, ikki yngri enn 19 ár, at koma at arbeiða hja okkum. Børnini í aðrum heiminum eru trý, 2 eitt ár gamlir dreingir og 1 fýra ára gomul genta. Í hinum heiminum er 1 trý ára gamal drongur. Tú mást hava koyrikort. Vit hava eisini íslendsk ross á heiminum. Vinarliga ring 00354-4644334 ella send
*teldupost: haganes@mmedia.is*

**MASKINMAÐUR SØKIR KJANS**
Søkt verður eftir avloysarakjansi sum maskinmaður ella dekkari. Alt hevur áhuga.
*Tlf. 229405*

## Barnaútgerð

**SIMO KOYRISTÓLUR**
Sera lítið brúktur til sølu fyri 1.000 kr.
*Tlf. 457351*

**TVÍBURAVOGNUR**
myrkabláur Simo combivognur til sølu.
*Tlf. 328041 ella 284428*

**SIMO KOYRISTÓLUR**
v/kalesju og lufthjólum svartur/gráur, brúktur til eitt barn, kr. 2000,-
*Tlf. 320325 ella 251515*

**TIL SØLU**
Philips babyalarmur model PB 0920, brúktur til eitt barn kr. 900,-
*Tlf. 320325 ella 251515*

**BILSTÓLUR**
ynskist til barn omanfyri 9 kg.
*Tlf. 441790 ella 225124*

**YNSKIST**
Klappstólur, Hokus Pokur stólur (borðstólur) og koyristólur, í góðum standi, til drong.
*Tlf. 421789*

**BILSTÓLUR**
Góðkendur Chicco bilstólur 0-10 kg. til sølu fyri 300 kr.
*Tlf. 314884*

**VOGNUR TIL TVILLINGAR**
Simo combivognur til tvillingar. Regnslag, flugunet, koyriposar og lyftir fylgja við.
*Tlf. 373400 ella 250530*

**TIL SØLU**
Lítið brúktur tvillingaklappstólur við regnslag til sølu.
*Tlf. 373400 ella 250530*

**TIL SØLU**
Hokus Pokus stólur til sølu.
*Tlf. 310144*

## Bátaútgerð

**10 MANNAFAR**
Stórt 10-mannafar við 22 HK Sabb motori.
*Tlf. 444539 ella 224988*

**BÁTUR TIL SØLU**
Um hóskandi boð fæst, er ein 20 fót glasfiburbátur við fiskiloyvi til sølu. Báturin er útgjørdur við snellu og linuveiðu. Er í sera góðum standi.
*Tlf. 216503*

**NEYST OG BÁTUR TIL SØLU**
Neyst í Sumba til sølu um nóg gott boð fæst. Tiggjumannafarið Mars, uttan fiskiloyvi, er eisini til sølu til hægstbjóðandi, men har er frammanundan boðið 30.000 kr.
*Tlf. 373420*

**BÁTUR VIÐ VEIÐILOYVI TIL SØLU**
25 fót føroyskt bygdur bátur til sølu, um hóskandi boð fæst. Báturin, sum er bygdur í 1980, hevur eini 16-20 hk. Sabb. Er útgjørdur við WHF, gps'ara við plottara og litekkoloddi og hevur annars alla neyðugtergð. Hevur veiðiloyvi í bólki 5 D.
*Ringið tlf. 448990/ 222569*

**PENTA MOTORUR**
Um onkur eigur ein Penta MD4 Dieselmotor. Vinarliga lat meg frætta frá tykkum.
*Tlf. 210367*

**EIN VOLVO PENTA**
MD 17-36 HK uttan gear, kann startast, til sølu fyri hægst bjóðandi.
*Tlf. 520325*

**TIL SØLU**
Ein Bukh DV 20 HK í góðum standi til sølu. Motorurin kann roynast. Prísur 10.000 kr.
*Tlf. 520325*

**GLASTREVJABÁTUR TIL SØLU**
27 fót glastrevjabátur í góðum standi, klárur til fiskiskap til sølu fyri 380.000 krónur ella hægstbjóðandi.
*Áhugað kunnu ringja 228856*

**YNSKIST**
2 hálvautomatiskar oljutrýstsnellur fyri max. 3000 kr. stk. Um tú hevur slíkar, so vinarliga ring
*424248 eftir kl. 18*

## Bingo

**GOTT BINGO**
verður í TB-húsinum tórskvøldið 13. mars kl. 19.00.
*Tvøroyrar Bóltfelag*

**PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN**
hevur bingo í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 12. mars kl. 18. Limirnir kunnu hava gest við.
*Nevndin*

**GOTT OYGGJABINGO**
verður í VB-húsinum onskvøldið 12. mars kl. 19.30. Á lutaseðli m.a. gávukort uppá 1.000,- kr.
*Dreingjaliðið hjá VB*

**GOTT BINGO**
verður í Pálsstovu mánakvøldið 10. mars kl. 19.00.
*Astma- og Allergifelagið*

**BINGO**
Kollafjarðar Ítróttarfelag hevur bingo í bygdarhúsinum í Kollafirði leugardagin 8. mars kl. 15.00.
*K.I.F.*

**GOTT BINGO**
verður í Framtiðini leygardagin 29. mars kl. 16.00. M.a. verða stór páskaregg at vinna á lutaseðli.
*Vágs Svimjifelag*

**PÁSKAEGGJATOMBOLA FRAMSKUNDAÐ**
Páskaeggjabingo í Kvívík, sum var lýst at verða sunnudagin 23. mars kl. 16.00, er flutt til leygardagin 22. mars kl. 15.00.
*KFUM skótarnir í Kvívík*

**GOTT BINGO**
verður í Tórsholl leygarkvøldið 8. mars kl. 20.00. Spælt verður bingola og eykaspæl.
*Tórsholl*

**GOTT BINGO**
verður í Roynhøllini 11.3.2003 kl. 19.30 til frama fyri Missiónshúsið í Hvalba.
*Missiónshúsið*

**BINGO**
verður í Pálsstovu leygardagin 8. mars kl. 15. Full pláta 500 kr. + síðuvinningar. Á lutaseðli 2 x 500 kr. + ein vikuskiftisflogferð til DK. Bingola, eykaspæl, koyring heim.
*Kiwanisfelagið Rósan*

**HEIMABINGO**
Spæl heimabingo og vinn eina uttanlandsferð við nýggju Norrønu. Send bingoplátuna inn áðrenn 1. mai. Drigið verður 15. mai 2003. Fáast til keyps um alt landið.
*Bygdarfelagið Báran í Árnafirði*

**400 PÁSKAREGG**
Hví keypa páskaregg, tá tú kanst vinna tey í Glæmuni leygardagin 22. mars kl. 15.00. 400 páskaregg eru at vinna. Kaffi og kakur verða eisini. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*KFUM skótarnir í Kvívík*

**BINGO**
verður í EB-húsinum 10. mars kl. 19.30. Lutaseðlar verða seldir.
*EB*

**SUÐUROYINGAR**
Gott bingo verður í skúlaheillinni mánakvøldið 10. mars kl. 19.00. Hvørt bingo gávukort á kr. 300,00. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á kr. 1000 í olju frá Statoil. Páskaregg burturlutað millum spølini.
*Tvøroyrar Svimjifelag*

**SUÐUROYINGAR**
Vit hava bingo í Framtiðini mánakvøldið 31. mars kl. 19.30 Nærri lýst seinni.
*Kirkjukórið Ljómur*

**KAGGIN**
Gott páskabingo verður leygarkvøldið 29.3. Barnabingo kl. 15 og vaksin kl. 19. 15 vinningar á lutaseðli m.a. 2 gávukort á 1.000,- og 1 á 1500,-. Eisini verður spælt bingola og 20 kr. spæl.
*Kaggin*

**GOTT BINGO**
verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 15. mars kl. 16. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Glæman*

## Lýsingartekstur

_____

_____

_____

_____

_____

_____

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
*(set X)* undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Brævaskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Lutaseðlar | ❑ Leikur |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út-& sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ ..... |

***Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.***

Sent hevur:

Navn:……..

Bústaður:……

Bygd/býur:……

Tlf.: ……..

»Lýsingartorgið«
**Sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki